## DAGSINS MEINING

# Høgrastjórn við vandamiklum ætlanum

Nú er komið undir land við nýggjari stjórn í Ísrael, og tað ber í móti eini rættiliga víðgongdari høgrastjórn. Hetta er ein sera álvarsom gongd, tí ætlaninar hjá hesi stjórn eru sera víðgongdar, tá hugsað verður um Vestara Áarbakka, har flestu palestinensar búgva. Tað liggur á ljóði, at komandi stjórnin fer at nýta eitt komandi kríggj móti Iraq til av álvara at gera upp við palestinensarnar.

Hvat merkir so hetta? Jú hetta merkir sambært altjóða eyðgleiðarum, at Ísrael við valdi fer at flyta stórar hópar av palestinensiska fólkinum av Vestara Áarbakka og innlima partar av hesum øki í eitt komandi størri Ísrael. Oman á hetta kemur, at tað ljóðar eitt nú í norska útvarpinum, at Sharon hevur álvarsamar ætlanir um at reka palestinensar út úr sjálvum Ísrael. Her býr sum kunnugt meira enn ein millión av hesari tjóð, og Sharon hevur altíð mett hesar palestinensar sum eina hóttan móti innaru trygdini í landinum. Tað er tó lítið, sum bendir á, at altjóða samfelagið fer at góðtaka slíka etniska útreinskan í tí landi, sum skal umboða vesturlendskt fólkaræði í Miðeystri.

Hinvegin er væl hugsandi, at Sharon í tí ruðuleika, sum eitt kríggj móti Iraq fer at skapa í Miðeystri, kann sleppa gott frá at fremja umfatandi fólkaflytingar á Vestara Áarbakka. Í einum komandi kríggi móti Iraq hevur USA brúk fyri fullum stuðli frá Ísrael, og Sharon fer eins og onnur lond í Miðeystri at krevja sín prís fyri stuðulin. Tað kann vera, at Sharon fyri eitt styttri skeið á hendan hátt kann kúga palestinensisku tjóðina til at gevast við harðskapinum og til at binda frið ella at sleppa sínum krøvum. Men sum frá líður er hetta ein bæði ómoralskur og vandamikil politikkur. Vandin liggur í hesum, at politikkur Sharons ber við sær fræið til nýggjar stríðsspurningar og í tí, at hesin politikkur ikki loysir tann grundleggjandi spurningin í økinum nevniliga, hvør, ið eigur rættin til økini á Vestara Áarbakka. Tað er tí at vóna, at Vesturheimurin tekur sær um reiggj og setir Sharoin stólin fyri dyrnar, áðrenn ov seint er t.v.s., áðrenn lopið verður á Iraq.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Leiðslan í Heimarøktini sagt seg úr starvi

**Viðmerking í samband við, at øll leiðslan í Heimarøktini hevur sagt seg úr starvi**

**Jana H. Dalsgaard,**
*forkvinna, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar*



Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar harmast um, at øll leiðslan í Heimarøktini hevur sagt seg úr starvi. Vit undrast og spyrja eins og øll onnur, hvat orsøkin man vera.

Tað, at øll leiðslan fer samstundis ger sjálvsagt, at alt arbeiðið støðgar upp í eina tíð, og tá er vandi fyri, at tað, sum er uppbygt gjøgnum seinastu árini, meira ella minni, fer fyri bakka.

### Ikki lýsast eftir fakligum leiðara

Tá vit so tann 22. februar lesa í Dimmalætting, at landsstýrismaðurin á økinum sigur seg ikki vera vísan í, at starvið sum fakligur leiðari í Heimarøktini verður sett aftur, hvøkka vit sjálvsagt við. Hetta kann hann ikki meina í álvara.

Hetta verður eitt stórt afturstig, ja, einki minni enn ein katastrofa, serstakliga tá tað júst nú m.a.verður arbeitt við, at seta á stovn døgnrøkt fyri alt landið.

Havandi í huga menningina á hesum stovni og stóru avbjóðingarnar, ið standa fyri durum, hongur tað ikki saman. Sparingarnar á Sjúkrahúsøkinum føra jú við sær, at arbeiðsbyrðan í Heimarøktini økist enn meira .

Aftur eru tað tey eldru og tey veikastu í okkara samfelag, ið eru fyri vanbýti. Støðan hjá teimum er, sum vit øll vita, als ikki nøktandi frammanundan. Júst, sum vit nú skuldu havt góðar fortreytir fyri at betra teirra umstøður, verður »teppið rykkt undan«.

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fer undir ongum umstøðum at góðtaka, at tað ikki verður lýst eftir fakligum leiðara fyri Heimarøktina.

# Takk Hergeir Nielsen

**Kaj Leo Johannesen,**
*Sambandsflokkurin*



Eg fari við hesum at takka Hergeir Nielsen fyri sína grein í Dimmu undir heitinum »Søluátak Sambandsfloksins«. Hettar er spírin til eitt kjak, sum formaðurin í uttanlandsnevndini leggur upp til, eg haldi at uppskotið fekk alt annað enn eina syndarliga lagnu. Nú er tað soleiðis, at formaðurin loyvir sær at viðgera mína sálarliga støðu við at siga, at Kaj Leo Johannesen, sum legði navn til uppskotið, man verða ein ótrúliga vónbrotin maður. Her skal eg heilsa formanninum soleiðis, at hann ikki fær fortreð av hesum og siga, at uppskotsstillarin er ein ógvuliga glaður maður og sær seg hava gjørt eitt lítið ískoyti til kjakið um ES, uttan sjálvandi at tað kemur í nánd av, hvat formaðurin í uttanlandsnevndini hevur fingið á skaftið.

Undirritaði hevur tann veikleika at síggja sjálvt eitt lítið framstig, sum ein sigur. Vit skulu minnast til, at vit higartil hava stungið høvdið í sandin, og sum kunnugt hevur uttanlandsnevndin ikki tað stóru arbeiðsbyrðina, sambært formanninum.

Men undirritað er glaður og fyri at nevndin hevur hálað høvdið upp úr sandinum og hevur fingið heitt á landsstýrið at skipa fyri einari ráðstevnu um ES, hettar er undiritaði takksamur fyri.

Tað er ikki, rætt tá sagt verður, at limaskapur í ES treytar, at tú hevur ein sjálvstøðugan lim at lima inn. Skotland er limur uttan at verða sjálvstøðugur, mær vitandi er Åland limur uttan at verða sjálvstøðugur, eg haldi tað verða eitt slag undir beltið, tá formaðurin sigur, at »hendan limin ræðist Sambandsflokkurin«.

Formaðurin í uttanlandsnevndini veit, at í hesum føri kann ikki sigast, at Sambandsflokkurin ræðist, eftirsum Sambandsflokkurin er tann, sum hevur fingið uttanlandsnevndina at heita á Landstýrið, at skipa fyri einari ráðstevnu um ES.

Undirritaði metir, at tað er skaðiligt at sleingja út við populistiskum pástandum, sum formaðurin ger, við at siga, at vit í Sambandsflokkinum vilja geva okkara fiskiríkidømi burtur fyri einki. Hettar er burturvið og hevur einki við veruleikan at gera.

Víðari sigur formaðurin í uttanlandsnevndini, at Sambandsflokkurin lat Kaj Leo Johannesen stinga fingurin í jørðina. Lat meg gera formanninum greitt, at undirritaði legði sjálvur uppskotið fram.

Sambandsflokkurin virðir, at aðrir limir í flokkinum ikki noyðast at hava somu meining sum flokkurin í øllum, t.v.s beint øvugt av tí, sum vit kenna so væl frá Tjóðveldisflokkinum, har allir venda sær móti floksformanninum í tingsalinum og bíða eftir tí kenda signalinum, áðrenn teir siga sína meining.

Við vón um eina góða og gevandi ráðstevnu, sum kann menna vitan okkara um ES.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Setan av fornfrøðingi

**Onki krav til føroyskt mál, ið er grundin undir tjóðini!**

**Óluva Húsgarð**

Landsstýrismaðurin í mentamálum – ikki fólkavaldur, men við stórum valdi – hevur valt útlending framum føroying at vera stjóri á Fornminnissavninum.

Hetta prógvar, hvussu aftarlaga føroyingar standa! Til samanberingar: Tað hevði ikki verið lukkuligt, um íslendskur mentamálaráðharri hevði lýst í donskum blað eftir stjóra til almennan íslendskan stovn, og sum hevði sett dana framum íslending.

Íslendingar hava tjóðarstoltleika! Føroyingar hava ongan stoltleika! Føroyski umsøkjarin kann sleppa at vera hjálparmaðurin hjá dananum, ið hevur fingið starvið! Ikki tí at føroyingurin ikki hevur høgu útbúgvingina, ið krevst!

Sitandi landsstýrismaðurin í mentamálum kann ikki kenna nakað til málstríðið í 1930-unum, og tær avleiðingar hetta stríð fekk fyri ávís fólk!

Føroyingar kunnu ikki hugsa um fullveldi við sovorðnum fólki í landsins stjórn! Við fullveldi skal annað og meira til!

FORSVAR!

Tey fólk, ið forsvara hesa gerð, siga, at nógvir føroyingar hava leiðandi størv í Danmark!

Til hetta er at siga:

Ongin føroyingur fær leiðandi starv í Danmark, uttan at viðkomandi er fullkønur í donskum máli bæði í skrift og talu!

Talaði nakar um líkarætt í ríkisfelagsskapinum!

# Hugburður og persónur

**Høgni Debes Joensen**



Eitt fyribrigdi hevur kanska serliga í seinastuni gjørt vart við seg í Føroyum. Tað er hetta, at fólk í skrift og talu hava á lofti, at onkur stingur annan í ryggin, at framd verður bakbíting, at gingið verður frá givnum lyftum, at fólk siga seg úr flokkum av persónspurningum og so framvegis.

Við politiskari sannføring er soleiðis, at hon kann verða tengd at huginum til persónligan fyrimun, eins og hon kann vera tengd at samskifti við ávísar persónar, familju, vinir, kenningar ella starvsfelagar, ella sannføringin kann verða ektað -grundað á persónligan, sjálvstøðugan hugburð.

Rættilig sannføring, eitt nú politisk, kann ikki sigast at vera til yvirhøvur, er hon í størri mun knýtt at vina-, kenningar- ella ættarbondum. Tá er rætta heitið neyvan sannføing ella hugburður, men heldur vinalag ella í ringasta føri tað, ið nevnt verður opportunisma.

Kennir tú teg ikki knýttan at einari eitt nú politiskari kós av øðrum orsøkum enn persónligum áhugamálum, so man vera ivasamt ella misjavnt við hugsjónarliga støðinum. Tó kanst tú sum vera man í fleiri førum væl skilja, at onkur rættiliga og rættvíst hevur fingið stykni til fólk, ið ein higartil hevur kent seg í parti við.

At knýta seg til eina veruliga stevnu ella ætlan man bert hava ítøkiligt innihald, er hetta grundað á lívshugburð og ikki á persónar. Sjálvandi hava ávísir persónar umboðandi eina ávísa stevnu ella ávísan hugburð rættiliga ofta avgerandi týdning fyri, í hvønn mun fólk koma at gera hesa stevnu til sítt egna hugsjónarliga áhugamál. Men hevur tú nomið eina hugsjónarliga sannføring, so átti møguligur sympatiur ella antipatiur eftir tað at havt minni at týða, tí at tá er (ella tað átti at verið) tað, ið avgerandi týdning átti at havt, at verið tann stevna, ið tú sjálvur heldur vera hina røttu. Brennir tú fyri eini søk, so átti tað ikki at verið persónspurningar, ið gera av, antin tú heldur fast við sjónarmið tíni.

Ein samfelagslig sannføring kann í roynd og veru ikki verða tengd saman við, hvørjar persónar tær líkar og hvørjar ikki. Var tað so, at tú bert kundi verið felags um eina hugsjón ella ein hugburð saman við fólki, ið tær dámar, meðan tú vísir frá tær hugsjónir, ið eisini fólk, ið tær ikki dámar, hava, so vóru tey fá við felags hugsjónum yvirhøvur. Og tá hevði verið tvørligt at nátt teimum hugsjónarligu málunum. Á sama hátt kundi verið sagt, at var tín felagshugur treytaður av, at tú var samdur um alt við øll í sama bólki, ja, so mundu verða fá í hvørjum bólki, eins og bólkarnir høvdu verið nógvir -so mikið nógvir, at einki hugsjónarligt frambrot kundi verið framt yvirhøvur.

Jákupsstovumaðurin, sáli, segði einaferð, tá ið vit sótu og prátaðu í byrjanini av sekstiárunum, nakað, sum í veruleikanum er sera einfalt, man samstundis ógvuliga beinrakið. Veruleikin kann jú stundum vera einfaldur. Hann segði nakað soleiðis, tá ið prátið fell á politikk og politiskar flokkar: “Um tað nú var so, at øll tey, ið tóku undir við einum politiskum flokki, høvdu tað sjónarmið, at tey skuldu vera samd í øllum, ið flokkurin umboðaði av sjónarmiðum um alt, og skuldi teimum samstundis dáma øll tey fólkini, ið vóru í hesum flokki, so høvdu vit havt eins nógvar flokkar, ið tað eru fólk.”

Teimum, ið áhuga hava annars fyri umrødda evni, skal eg mæla til at lesa bókina “Hvor der handles” eftir Bettinu Heltberg, ið sera hugtakandi gevur sína mynd av stríðnum -eisini umrøtt sum kongamorðið-, tá ið danski politikarin Svend Auken varð vrakaður sum formaður í danska sosialdemokratínum til frama fyri Poul Nyrup. Hetta var, sum vera man, ein herskin biti fyri Auken at slúka, men hann varð kortini verandi í flokkinum og varð seinni danskur umhvørvismálaráðharri, valdur av sosialdemokratunum.

# Nýtt uppskot til tunnil í Suðuroy

**Ole V. Laursen, deildarleiðari á Miðnámsskúlanum í Suðuroy**



Stríð millum Vág og Tvøroyri hevur verið ein av orsøkunum til eina heldur treka framgongd sum heild í Suðuroynni. Tað hevur verið stríð um plaseringina av havnum og almennum stovnum v.m. Tað er sjálvsagt skiljandi, tá eingin vil lata frá sær at vera miðdepilin, har framgongdin plagar at vera. Úrslitið hevur verið lyndi til at stovna tveir miðdeplar, har menningin ikki hevur kunnað staðið mát við aðrir miðdeplar í landinum.

Samstarv er sjálvandi loysnin á trupulleikanum, men tað hevur verið trupult orsakað av tí torføra vegnum.

Vit á Miðnámsskúlanum kenna henda vegin sera væl. Hann er vandamikil og torførur at koyra eftir. Ofta havi eg verið bangin um, at nakað skuldi henda næmingunum á skúlavegnum.

Tað vóru tí gleðilig tíðindi, tá vit fyri nøkrum árum síðani hoyrdu um tunnilin undir Hovstúgvu. Hann fór at taka burtur tey vandamiklu økini á skúlavegnum.

Vit dugdu bara ikki at skilja, at tunnilin bleiv lagdur heilt uppi á fjallinum av hesum orsøkum:

- Hann styttir bara koyritíðina nakrar fáar minuttir.

- Tað eiga heilt vist at vera betri støð at leggja tunnilin, soleiðis at hann loysir ferðslutrupulleikarnar betri.

- Tað letur seg gera at bora ein tunnil undir Vestmannasund og kann tí ikki vera ein tekniskur trupulleiki at leggja hann á einum meira hóskandi staði.

Vit komu ásamt um, at tað var nokk tann ódýrasti hátturin at gera vegin tryggari.

### Nú er komið eitt nýtt uppskot til tunnil

Felagið, sum gjørdi tunnilin undir Vestmannasundi, kann gera ein tunnil á einum nógv betri stað. Og vit hoyra, at orsøkin til at Landsverkfrøðingurin ikki sjálvur hevur skotið hesa plaseringina upp, er tí at teirra útgerð er avoldað.

Tað nýggja tunnilsuppskotið hevur við sær:

- Ein sleppur undan at koyra upp á fjallið.
- Ein sleppur undan teimum brøttu svingunum í Hovi.
- Ein sleppur undan einum vegastrekki í Hovi, sum ofta gevur trupulleikar í kava.
- Koyritíðin verður munandi styttri.
- Orkunýtslan verður munandi minni.
- Tunnilin verður haraftur-at bíligari enn ein tunnil, sum liggur longri uppi á fjallinum.

Øll í Suðuroynni mugu vera glað um nýggja uppskotið. Ikki bara fólk úr sunnaru helvt, sum koma léttari til Smyril, men serliga fólk í norðaru helvt, sum eiga børn mugu vera glað. Ein stórur partur av teimum ungu taka studentsprógv á Miðnámsskúlanum. Við byggingini av einum nýggjum Miðnámsskúla og munandi betring av skúlavegnum kunnu foreldur vera rólig um framtíðina hjá børnumum. Tað nýggja tunnilsuppskotið er ein vegur, sum frá tí langa vegastrekkinum í Hovi heldur fram stórt sæð í eini beinari linju til Øravíkar. Tað er ikki ivi um, at tað er nógv tann besta ferðsluloysnin. Hon vil uttan iva draga Suðuroynna saman og kann vera við til at seta meira ferð á menningina her.

Nú vóni eg ikki, at tað koma smápolitisk stríð upp í málið soleiðis, sum tað plagar. Men lat okkum øll her í Suðuroynni stuðla tí nýggja tunnilsuppskotinum.